Viðmerking:

# Tvinnir kostir fyri framman — hvørgin er mjúkur

*Í orðaskiftinum um loysing og samband er mestsum sligið fast, at fyri framman er valið eittans: at vit loysa úr danska ríkinum og koma í búskaparliga kreppu ella so verða vit verandi í danska ríkinum og tá heldur verandi búskapur fram ótarnaður. Hetta er ikki heilt beint. Heldur er tað, sum so mangan, at fyri framman eru kostirnir tvinnir og hvørgin teirra mjúkur. Tí ætli eg mær at grundgeva fyri*


*Hermann Oskarsson skrivar*

**Tilvitað val**
Ivaleysa væl er skrivað og málað á veggin um, at sleppa vit okkum av við ríkisstuðulin og allar aðrar danskar veitningar, so fer búskapurin at minka munandi, hóast vit í dag hava avlop í almennu køssunum og avlop í samskiftinum við útheimin. Hesin parturin av upplýsandi uppgávuni hjá Landsstýrinum, sum stevnir fullveldiskósina, er borin greitt fram. Her er ivaleysa nógv gjørt av, soleiðis at myndin, vit hava av sjálvstøðuga búskapinum, heldur er meira døpur enn væl er. Danskir búskaparfrøðingar hava ljóðandi meira bjartskygda mynd enn vit av egnu sjálvstøðugu framtíð okkara.

Framtíðar valið er í orðaskiftinum vorðið soleiðis, at fyri framman stendur at hvør einstakur sigur sítt ja ella nei til eina einastu stevnu, sum er at loysa Føroyar til sjálvstøðugan stat. Men valla er tað nakrantíð soleiðis í lívinum at fyri framman okkum stendur valið um eitt einstakt. Ongantíð er valið minni enn millum tvinnar kostir, og veljast skal annar, so at tú sjálvstøðugt hevur valt framhaldandi lívið, uttan mun til um tað fer eftir øðrum vegnum ella hinum. Á einum atkvøðuseðli fært tú kanska bara valið ímillum at skriva kross í rútarnar fyri ja ella nei um eina einstaka stevnu, men lívið skiftir kós í báðum førum, og tí eru sjálvstøðug val í báðum rútum at vela. Í veruleikanum velir tú ja ella nei í báðum rútum, hóast tað ljóðar heldur løgi. Tí er rímuligt at spyrja um avleiðingarnar av at velja aftur gomlu skipanina, sum letur donskum ríkismyndugleikum politiskt vald aftur fyri ríkisveiting. Tað er ikki bara í hugaheiminum at tað er eitt tilvitað val at fara aftur á gomlu slóðina. Eisini í politisku gongdini og sjálvari búskapargongdini fer tað at merkjast sum broytt kós, tí tær Føroyar sum komu undan kavi eftir kreppuna, eru ikki tær somu sum fóru undir kav fyrra partin av nítiárunum. Hetta grundi eg á tvær orsakir.

**Eitt millumvaldsbil**
Tann fyrra er, at vit hava nú í nøkur ár livað í einum bili, líkt einum interregnum — einum millumvaldsbili - tá ongin greið samfelagspolitisk stevna setir áralagið. Í nøkur ár hava almennu kassarnir havt avlop, sum koma heilt upp ímóti støddini á ríkisveiitingini. Telja vit lánsavdráttir uppí, so er konsolideringin hjá almennu køssunum eins stór og ríkisvieitingin seinastu árini. Tað merkir tað sama sum at almennir kassar fáa ríkisveitiningina, men brúka hana bara í lítlan mun, og økja tí lítið um innlendska eftirspurningin. Millum landsins borgarar er hugburðurin ikki ólíkur hesum. Síðani framgongd sást í búskapinum og inntøkurnar gjørdust frægari, bæði hjá einstaklingum og fyritøkum, hevur eitt vist varsemi verið at síggja í atburðinum. Hóast munandi betri inntøkur, hava hvørki einstaklinganýtslan ella íløgurnar hjá fyritøkunum gjørt nøkur skarvslop. Tað sær út sum bíða bæði húsarhald, fyritøkur og tað almenna sjálvt eftir einari avgerð um tær fortreytirnar, sum vit skulu laga okkum til.

**Tilfeingismeðvit og liberalisering**
Seinna orsøkin er, at leiðin burtur úr kreppuni hevur verið merkt av hugtøkunum sparing og liberalisering.
Sparingin er eitt breitt hugtak, sum fevnir um skilagóða og effektiva tilfeingisnýtslu sum heild. Tað merkir ikki bara at brúka minni, men at brúka við skili, soleiðis at mest gagn fæst burturúr hvørjari krónu. Sjálvandi er ilt at staðfesta ella prógva tilveruna av nýggjum hugburði, men eg váði at siga húsarhaldini vera meira ansin í nýtsluni og meira varin at seta seg í skuld. Valla ivast nakar í at tað almenna brúkar minni part av inntøkunum enn fyrr hevur verið lagið, og avlop í almennu køssunum ár undan ári er ókent fyribrigdi undir gomlu skipanini. Vinnufyritøkurnar eru meira varligar bæði í rakstri og íløgum, so at virkisførið og kappingarførið væntandi eru batnaði í mun til gamlar dagar. At allir partar av búskapinum eru meira ansin um at brúka tilfeingið skilabest, kemur ikki bara av broyttum hugburði, men eisini av tí at karmarnir um búskaparligu tilveruna eru broyttir. Samanlagt er farin fram ein liberalisering av samfelagsbúskaparligu kørmunum. Føroyar eru í dag meira at kalla marknaðarbúskapur heldur enn studningsbúskapur, sum undan kreppuni. At húsarhald eru meira ansin at veðseta seg, kemst bæði av at ískoytið til rentuútreiðslur minkar, at pengastovnarnir eru meira ansnir um veðsetingarvirðini, at arbeiðsloysi ella minni vinnutrygd er vorðin ein meira verulig hóttan í hugaheiminum hjá tí einstaka. Politisku báknini um at hvør einstakur skal sjálvur gjalda í meira mun til eftirlønina, um at rentustuðilin verður uppaftur minni, um at privatisering og kommersialisering av tænastum fer at økja um borgarakostnaðir, gera eisini sítt til at húsarhaldini verða meira ansin í nýtslu og veðseting.

At fyritøkurnar ikki loypa á leistum í stórsligin íløguævintýr, sum lagið mangan var í gomlum døgum, kemst heldur ikki bara av broyting í hugburði, men í stóran mun av at fyritøkurnar ikki kunnu rokna við almennum veðhaldum til lán og rakstrarstuðul í sama mun sum áður. Haraftrat kemur so at vinnuligu karmarnir um serliga fiskiskap og fiskavirking eru munandi broyttir, soleiðis at hesar vinnurnar í dag virka í einum liberaliseraðum umhvørvi, eins og politisku báknini benda á enn meira liberalisering av vinnukørmunum.
Liberaliseringin av vinnuliga umhvørvinum hevur ávirkan á allar vinnupartar og marknaðir. Fíggjarmarknaðurin, allir vøru- og tænastumarknaðir og arbeiðsmarknaðurin eru ávirkaðir av broyttu kørmunum og útlitinum til meira liberalisering.

Samanumtikið eru vit hesuferð komin úr kreppuni á annan hátt enn áður. Fyrra størra kreppan vit eru komin úr var heimsumfatandi oljukreppan, og ta ferðina komu vit úr henni við heilt øðrum hugburði og heilt øðrum áratøkum. Meðan loysnin upp á kreppuna fyrst í sjeytiárunum — sum bæði var oljukreppa og fiskivinnukreppa — var rakstrarstudningur og íløgustudningur, hevur loysnin hesu ferð verið ein tillaging hjá øllum pørtum at standa á egnum beinum. Vit eru komin soleiðis burturúr kreppuni hesu ferð, at vinnuliga umhvørvið og búskaparpolitiska skilið er munandi betri enn undan kreppuni.

**Tilfeingiskreppa ella skipanarkreppa**
Frammanfyri okkum stendur tí ikki bara valið fyri ella ímóti at fara úr danska ríkisfelagsskapinum, ella valið fyri ella ímóti tí samráðingarúrsliti, sum kemur burtur úr samráðingunum, men eisini valið fyri ella ímóti at venda aftur á gamla lagið. Vit menniskju eru helst soleiðis, at tá vit fáa fortreytirnar at vita, so fáa vit okkum mest møguligt gagn av teimum. Og samfelag millum menniskju ber seg ikki annaðleiðis at. Verður úrslitið av gongdini soleiðis, at vit fara undir aftur ta skipan, at danskir ríkismyndugleikar betala fyri at hava politiskt vald, so ivist eg ikki í, at vit fara at gera mest gagn av tí skipanini. Vit fara ikki at lata politiskt vald til eina aðra tjóð uttan at fáa sum mest av vælferð afturfyri, tí søgan sigur okkum at allir politiskir flokkar, og hvør einstakur borgari somuleiðis, vilja hava mest møguligt í sín part av tí tilfeingi, sum vit fáa uttaneftir. Tað er onki sum bendir á at vit fara at lata politiskt vald frá okkum fyri at fáa sum minst afturfyri.

Trýstið, sum veljarar og vinna fara at leggja á politisku flokkarnar og politiska valdið, verður um at fáa sum mest av tí vælferð ríkisveitingin gevur, í sín part. Stríð fer aftur at standa millum landspartar um part í vælferðini, danska ríkisveitingin gevur, trýst fer aftur at koma á politikarar og politiska valdið um at lata vinnuni studning, eins og veljaraskarin sum heild fer at vilja hava gagn av ríkisveitingini.

Svara mær kannst tú og siga, at sama stríðið um part í vælferðini er í dag. Gamaní, men politiska valdið í landinum hevur avgjørt at avlopið hjá almennu køssunum skal vera stórt, og tí er stórur partur av virðunum vit skapa og gávuni vit fáa úr Danmark, hildin uttanfyri eftirspurningin. Og frammanundan tí vóru avdráttarskyldurnar so stórar og virðisskapanin so lítil, at ongi avlop vóru at býta av.

Tá avgerðin er fallin um ríkispolitisku viðurskiftini, fara allir partar at laga seg til ta framtíð, sum tá stendur fyri framman. Verður loyst frá Danmark, so fara vit inn í eina kreppu, sum er ein tilfeingiskreppa, tí tað stutt og greitt verður minni til av virðum í samfelagnum, enn verið hava frammanundan. Verða vit verandi í ríkinum, fara vit inn í eina sonevnda strukturkreppu, tí eftir mínum tykki venda vit tá aftur frá einari mennandi liberalisering og skilagóðari tilfeingisnýtslu til ein studningsbúskap við almennari uppílegging í flestu marknaðir.

**Aftur til gamla sáttmála?**
Tilfeingiskreppan er væl lýst í kjakinum, hóast lýsingin er merkt av ríviligum bjartskygni frá øðrum partinum og svartskygni uttan mýkindi frá hinum partinum. Burtur úr hesum hevur vanligi lurtarin kanska fingið eina skilagóða miðalmynd.

Hvør er so strukturkreppan fyri framman? Konkretu møguleikarnir eru óteljandi, men meginrákið í gongdini kann gitast um.
Samráðingarnar við ríkisstjórnina um nýggja heimastýrisskipan fara at miða eftir at fáa so stóran vælferðastyrk sum til ber, aftur fyri tað politiska vald ið latið verður ríkisstjórnini. Illa er hugsandi at føroyingar góðtaka annað enn tað, ella at danska ríkisstjórnin torir annað enn tað. Fyrsta stigið er tí ein ríkiliga stór ríkisveiting — mest trúliga av somu støðd sum í dag.
Næsta stigið er at fáa gagn av styrkinum, tí tað er ikki hugsandi at danska stjórnir fáa loyvi frá veljarum sínum at lata føroyingum vælferðastyrk til at seta á bók. Men hvat gagn vit gera av styrkinum, tað stendur í veruleikanum til veljararnar og vinnuligu ávirkanina á politisku skipanina. Lítil orsøk er til at vænta annað enna at kravið frá veljarum og vinnulívi vera sum undan kreppuni, og tí er mest trúligt, at ein partur fer til íløgur hjá tí almenna, ein partur fer til at økja almennar tænastur, ein partur fer til at minka nettoskattatrýstið og í aðrar mátar økja um vælferðina hjá húsarhaldinum og ein partur til vinnuligar studningar av ymsum slag.

Í tann mun, sum tað almenna brúkar pengarnar til at økja almennu tænasturnar og til almennar íløgur — sum helst er mest neutrala nýtslan av veitingini - fer gongdin at økja um innlendska eftirspurningin og harvið at leggja trýst á innlendsku marknaðirnar, so at faktorinntøkan í innlendskari vinnu batnar í mun til hana í útflutningsvinnu. Somuleiðis fer tað almenna at vaksa sum partur av búskapinum.

Í tann mun, sum tað al-



Viðmerking:

menna brúkar pengarnar til at minka nettoskattatrýstið og økja vælferðina hjá húsarhaldinum í aðrar mátar, hevur gongdin somu ávirkan á innlendska virksemið, prísir og faktorinntøkur. Harumframt kann tað léttliga fáa ávirkan á liberaliseringstilgongdina eins og á tilfeingissparandi hugburðin. Hví skulu borgarar landsins fara at gjalda til egna eftirløn tá tað almenna er vorðið ríkari og meira sinnað at brúka av pengunum? Hví skulu veljararnir gjalda brúkaragjøld ella marknaðarprís fyri tænstur, sum áður hava verið landsuppgáva — so sum telesamskifti, postflutning, ferðafólkaflutning og annað mangt. Hví skal rentuískoytið til húsabygging minkast og hví skal rentuinntøka skattast, um tað almenna kann lætta um hjá ungum fólki at seta búgv?
Í tann mun, sum pengarnir fara til at dugna útjaðaranum, fer tað at fáa ávirkan á almennu íløgurnar og aktivitetin innanlands.
Í tann mun, sum pengarnir verða brúktir til vinnustuðul, fer tað at avlaga kappingina um kapital og arbeiðskraft, so at vit aftur fara at hava stórar partar av vinnutilfeinginum bundið í vinnur, sum ikki bera seg á vinnuligum grundarlag. Fiskivinnan er tann, sum í gomlu skipanini fekk mestan stuðulin. Hetta kemst av ymsum ávum.
Partvíst kemst tað av tí vanligu kappingini, sum fer at verða millum allar samfelagsbólkarnar, og fiskivinnan er tann, sum hevur havt sterkast ávirkanina á politisku skipanina. Men partvíst kemst tað av, at tað er mest rasjonelli og í støðuni skilabesti politikkur, at veita fiskivinnuni studning, tá landið fær ríkisstuðul. Tí øll onnur nýtsla av pengunum, sum omanfyri er greitt frá, fer at økja um vinnuførið hjá heimamarknaðarvinnunum í mun til útflutningsvinnuna. Hvørja ferð ein króna av ríkisstuðlinum verður brúkt til at bøta um vælferðina hjá húsarhaldinum, økist trýstið á útflutningsvinnurnar. Hvørja ferð ein króna verður brúkt til almennar íløgur ella almennar tænastur, økist trýstið á útflutningsvinnurnar.

Í tann mun, sum pengarnir verða brúktir til vinnuligan studning, fer tað at avlaga tað liberaliseringstilgongd, sum er grundarlagið undir gongdini móti sunnari og sterari fyritøkum. Fáa fiskiskip á heimaleiðum á onkran hátt kapitalstyrk frá tí almenna, fer tað at ávirka prísirnar á skipum og prísirnar á døgum, uttan at tað avgjørt fer at gera fyritøkurnar sterkari. Fáa virkini studning, fer tað at økja um fiskaprísin, uttan at tað avgjørt fer at gera fyritøkurnar sterkari. Fiskivinnan er í tí støðu, at hon illa kann fáa studning uttan at venda aftur til eitt annað slag av regulering, enn hana vit hava í dag, og satt at siga dugi eg illa at hugsa mær hvussu fiskivinnan kann fáa part av øktu vælferðini av donsku ríkisveitingini, uttan at tað fer at spilla alla liberaliseringsgongdina, sum verið hevur.

Men fær fiskivinnan ikki studning, kemur hon eisini í trupulleikar, tí meðan allar aðrar vinnur kunnu luttaka í innlendsku inflasjónini, kann fiskivinnan tað ikki, og tí fer henni at mangla bæði kapital og fólk. Ilt er at hugsa sær annað, enn at vendast má aftur til eina skipan, har tað almenna letur studning við aðrari hondini, og við hinari stýrir tilgongd og frágongd í vinnuni.

**Útgangur**
Her er stutt nortið við nakrar av teimum skipanarligu trupulleikunum, sum vit koma okkum útí, um vit venda aftur til eina ríkisstudningsskipan. Málið er ikki lýst eins væl og teir vælferðatrupulleikarnir eru lýstir, um vit sleppa okkum undan ríkisstudningunum, men tó skuldi fegin staðið greitt, at valið ikki stendur millum eina léttgongda og eina illgongda leið, men at valið heldur stendur millum tvær leiðir inn í framtíðina, sum báðar hava sínar íbornu trupulleikar.

Sannleikin er tann, at vit eru vaxin fleiri tummar gjøgnum kreppuna. Vegurin úr kreppuni hevur verið merktur av skilagóðari tilfeingisnýtslu — kanska av neyð, men ikki minni væleydnað kortini. Vegurin úr kreppuni hevur eisini verið merktur av búskaparliga heimsrákinum, sum er liberalisering av marknaðum og áðurnevnda neyvstýring av tilfeingisnýtsluni. Og enn hava vit so langt í frá troytt allar møguleikarnar.
Og ein afturvending til gomlu skipanina — ella rættari full nýtsla av rættindunum og ríkidøminum í gomlu skipanini — fer at koma í andsøgn til rákið, sum í er komið síðani kreppuna. Uttan at hugsa um hvørjar konsekvensir tað hevði fyri ríkisrættarligu støðuna, eru føroyskir, danskir og aðrir analytikarar komnir til hesar liberaliseringsloysninrnar og tilfeingissparandi gongdirnar. Og ein kúvending fer at føra til nýggjar konfliktir, tí tilvaxandi búskapargongdin hevur undirtøku tvørtur um ríkispolitisk mørk í Føroyum. Tá um ræður ríkispolitisk viðurskifti og tá um ræður búskaparpolitisk viðurskifti ganga mørkini ikki eins millum fólk. Tú finnur liberalistiskar sambandsmenn eins snilt og liberalistiskar loysingamenn.

**Hermann Oskarsson**

# Fimleikaframsýningar

Fimleikaárið er farið at halla, og Havnar Fimleikafelag endar árið við tveimum framsýningum.

Nú várið er á veg, fara fimleikafeløgini kring landið at sýna fram tað, tey hava vant í vetur. Størsta fimleikafelagið í landinum Havnar Fimleikafelag fer, sum vant, at hava tvær framsýningar.

Í vetur hava einir 1200 fimleikarar íðkað fimleik hjá Havnar Fimleikafelag, bæði rútmiskan fimleik og amboðsfimleik, og tilgongdin veksur hvørt ár. Sjálvt um tað eru flest genttur, sum gera fimleik, eru dreingirnir eisini komnir fyri seg, og tað er at fegnast um. Veturin hjá Havnar Fimleikafelag hevur í ár verið serligur, við tað at felagið fylti 90 ár í desember 1999. Í hesum sambandi skipaði felagið fyri eini gallasýning í Norðurlandahúsinum í desember í fjør, sum bæði felagið og áskoðararnir vóru sera væl nøgdir við.

Av tí, at fimleikararnir eru so nógvir í tali, verða tvær sýningar, ein við yngru liðunum og ein við eldru liðunum. Fyrra sýningin verður leygardagin 1. apríl kl. 16:00. Á hesi sýningini fara vit at síggja tey 3 til 9 ára gomlu, umframt hesi liðini, verða eisini tey yngru grand prix liðini hjá felagnum, pinkurnar og smágenturnar. Seinna sýningin verður mánakvøldið 3. apríl kl 19:00 og her fara vit at síggja eldru barnaliðini og vaksnamanna liðini.

Til báðar framsýningarnar verða ídnaðarprógv og nálir handaðar. Ídnaðarprógv fáa tey, sum hava møtt best og eru ídnast á sínum liði. Tað er ikki óvanligt, at fleiri á einum liði kvalifisera seg til eitt ídnaðarprógv, og í slíkum førum verður lutakast. Teir fimleikarar undir 14 ár, sum eru við í lutakastinum um ídnaðarprógv, men ikki fáa tað, fáa ein vatndunk, sum Havnar Fimleikafelag stendur á. Hesir dunkar vera eisini til sølu á báðum sýningunum, fyri einans 50,- krónur. Ein fimleikari, sum einaferð hevur fingið eitt ídnaðarprógv, kann ikki fáa eitt aftrat. Fimleikafelagið letur eisini 5 -, 10- og 15 árs nálir.

Ein trupulleiki, sum ofta er, tá ið fimleikaframsýningar eru, er at tað tekur langa tí at fáa amboðini fram og beina tey burtur aftur, alt ov ofta verða ov langir steðgir millum liðini. Henda trupulleika hevur Havnar Fimleikafelag roynt at gjørt nakað við. Leiðararnir hava arbeitt nógv saman, um at skipa sýningina til eina heild uttan óneyðugar steðgir. Hvussu hetta fer at eydnast, fáa vit at síggja í Høllini á Hálsi leygardagin 1. apríl kl 16:00 og mánakvøldið 3. apríl kl 19:00. Kostnaðurin til sýningarnar eru 70,- kr fyri vaksin og 10,- kr fyri børn.

# Føroya Landsstýri

Stílað: Signari á Brúnni, landsstýrismanni í undirvísingar- og mentamálum.

Undirritaðu skúlaleiðarar í Eysturoynni, sum umboða 1700-1800 næmingar, hava viðgjørt støðuna, nú sáttmálasettu lærararnir hava verið í verkfalli síðan 8. mars.

Av tí at sáttmálasettu lærararnir undirvísa í miðal umleið ein triðing av pultstímunum, verður undirvísingin skerd so munandi, at skúlin als ikki virkar sum undirvísingarstovnur. Fleiri flokkar hava lítla og onga undirvísing fingið, síðan verkfallið byrjaði.

Heldur hetta lagið fram í langa tíð afturat, verður drúgt at byggja tað uppaftur, sum nú verður brotið niður.

Í løtuni er støðan í skúlanum ótolandi, og tí verður inniliga heitt á tygum sum landsstýrismann í skúlamálum og ábyrgdarhavandi at taka stig til, at málið verður loyst **beinanvegin.**

Fuglafjørður, tann 23. mars 2000.

Fuglafjarðar skúli, Súni í Hjøllum
Leirvíkar skúla, Ólavur Sjúrðarberg
Gøtu skúli, Hans Mourits Foldbo
Runavíkar kommunuskúli, Osmund Lamhauge
Tofta skúli, Marita Dalsgaard
Stranda skúli, Richard Johansen
Skála skúli, Súni Kristiansen
Oyndarfjarðar skúli Hallur Ellingsgaard
Funningsfjarðar skúli, Emil Jacobsen
Funnings skúli, Tórhild Bjarkhamar
Gjáar skúli, Jan Thomsen
Eiðis skúli, Vagn Foldbo
Norðskála/Oyra skúli, Arnold Joensen
Felagsskúlin á Oyrarbakka, Hans Erland í Brekkunum

# Til foreldur at næmingum í Kollafjarðar Skúla

Viðvíkjandi støðuni í skúlanum í samb. við verkfallið hjá lærarunum

Nú allir sáttmálasettir lærarar eru í verkfalli, er Kollafjarðar skúli sera hart raktur, við tað at undirvíst verður undir 40% av vanligu tíðini. Hetta hevur við sær, at næmingarnir missa nógvar undirvísingartímar, men av tí at uppmøtingin eisini er óreglulig, missa teir enn meir, tí ringt er hjá lærarunum, sum ikki eru partur av verkfallinum at leggja undirvísingina til rættis, tá teir ikki vita, hvør er í skúla. Harafturat verður undirvísingin sera nógv órógvað, við tað, at teir næmingar, ið hava frí mitt í skúlatíðini ganga í skúlagarðinum ella inni í skúlanum.

Dømi eru um, at børn, ið ikki eru von at ganga einsamøll millum skúla og heim, hava gjørt tað, og kundi stórur vandi staðist av hesum. Sum øll vita, er sera nógv ferðsla á økinum við skúlan í løtuni.

Skúlanevndin hevur viðgjørt støðuna og hevur umhugsað at steingja skúlan, men av tí at vit ikki hava myndugleika til tess, letur hetta seg ikki gera.

**Vit fara tí at heita á foreldur at hava børn teirra heima til verkfallið er av.**

Velja tygum at gera eftir áheitanini, má hetta fráboðast skúlaleiðaranum.

**Vinarliga**
**Kollafjarðar**
**Skúlanevnd**

**Arnbjørn Kristiansen,**
**formaður**

Kollafjarðar Barnavernd
410 Kollafjørður

23. mars 1000

Til øll foreldur at børnum í Kollafjarðar Skúla

Vísandi til skriv frá Skúlanevndini um hvussu hættislig støðan er við skúlan nú meðan verkfalli er,



mælir Barnaverndin eisini til, at foreldur ikki senda børnini í skúla.

Vit meta at í Kollafirði gera serstakar umstøður seg galdandi, av tí at bygdin er so long og at tað fyri tíðini er serliga nógv og tung ferðsla, vit hugsa um teir mongu lastvognarnar, sum júst í hesum døgum koyra útgrevstur frá bygging av ítróttarhøll við skúlan og grót til bátahyl á Signabø.

Av tí at undirvísingin er skerd við 60% sigur tað seg sjálvt, at tað er nógv frítíð, og teir lærarar sum undirvísa kunnu ikki eisini ansa børnunum, sum hava frítímar.

Hettar er ein roynd at binda um heilan fingur.

**Vinarliga**
**Kollafjarðar**
**Barnavernd**